## Facebook er sum sigarettin

Umleið fimti hvør dani kennir, at viðkomandi nýtir ov nógva tíð til sosiala netverkið á internetinum. Hetta vísir ein nýggj kanning. Serfrøðingar samanbera Facebook og aðrar líknandi síður við sigarettir, sum vit ikki klára at liva fyri uttan. Tíggjundi hvør dani er á Facebook, og tað koma 1600 nýggj um dagin, vísa tøl hjá Københavns IT-Universitet. Sambært Universitetinum er tað eisini soleiðis, at hesar tænastur á netinum, stjala eina rúgvu av tíð frá okkum. Hetta vísir ein kanning hjá IUM, sum hevur gjørt fyri Microsoft. Hon vísir, at 17,2 prosent av øllum dønum meta seg nýta ov nógva tíð til sosiala netverkið á netinum. So kann mann bert gita, um støðan er líknandi í Føroyum.



## Aftur ferðsluóhapp í Øravík

Millum ár og dag, hava sera nógv ferðsluóhapp og ferðsluvanlukkur verið í Øravík. Aftur hetta vikuskiftið hevur eitt ferðsluóhapp verið í bygdini. Fimm fólk vóru nevniliga í einum bili, ið varð knústur sundur. Fyrst rakar hann bilverjuna á høgru síða, fyri síðani at fara sendandi í hina síðuna, har bilurin rakti ein grótvegg. Bilurin endaði at enda á takinum. Ein fór úr bilinum at ringja eftir hjálp, og øll fólkini vóru send á sjúkrahúsið til kanningar. Helst var orsøkin til ferðsluóhappið bara hálkan. Hetta var bert eitt av umleið tíggju ferðsluóhappum í hálkuni um vikuskiftið.

## Hetta verður harðari enn Hetlands-ferðin

Á sumri 2005 herfyri avgjørdi manningin á kappróðrarbátinum »Havrenningur«, sum er tað gamla áttamannafarið »Nevið Reyða« at gera eitt bragd: At rógva allan teinin úr Klaksvík til Hetlands.

Við á hesi ferðini vóru Livar Nysted, Símin Esmar Vágsá, John Erik Fredriksberg og Fróði Waag.

Hesin túrurin tók einans seks dagar, men teir komu ikki heilt á mál, tí teir máttu gevast orsakað av illveðri á leiðini, bert 18 fjórðingar úr landi.

- Tað var sera harmiligt, at vit máttu gevast so stutt úr landi. Men eg fekk so í øllum førum ein forsmakk uppá, hvat tað vil siga at rógva millum lond.

- Men henda ferðin við La Mondiale verður av heilt øðrum slagi.

Nú skal so næsta bragdið fremjast í verki. Áðrenn tað, skulu í milliónatali av áratøkum takast tvørtur um Atlantshav!

# - Tey halda meg vera



*- Hetta verður ein harður túrur, sigur Livar S. Nysted úr Hvannasundi, sum eisini er kendur listamálari. Aftanfyri hann síggjast nakrar myndir, ið lýsa ferðina tvørtur um Atlantshavið*

Mynd: Anna V. Ellingsgaard

*Hetta hevur nakað við at útfordra meg sjálvan ... og ja, eisini hetta við at leita eftir spenningi, greiðir hann frá. Eg havi altíð havt ein dreym um at gera nakað, sum eingin annar hevur gjørt*

**- Mær hevur altíð dámað væl at rógva. Nú vil eg fegin gera nakað, sum eingin annar føroyingur hevur gjørt áður - at rógva teir 300 fjórðingarnar tvørtur um Atlantshavið við mettíð, sigur 38 ára gamli, Livar S. Nysted úr Hvannasundi. Nýggjársaftan setist hann við árarnar umborð á bátinum »La Mondiale« á Kanarisku Oyggjunum. 30 dagar seinni er ætlanin at leggja at í Barbados**

HAVRÓGVING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Hvannasund:** - Eg vil ikki nevna meg sjálvan ónormalan. Men at rógva ein slíkan tein, er í øllum førum ikki nakað sum vanlig fólk kunnu gera, sigur hann við einum brosi.

At rógva tvørtur um Atlantshavið er roynt so mangar ferðir áður. Men tá hevur tað altíð tikið longur enn ein mánað.

Ein av felagsskapunum sum hava roynt hetta eru menn í Ocean Row Events. Í januar í ár róðu teir úr Kanarisku Oyggjunum til Barbados eftir 33 døgum, men við tí sterka Livari Nysted og 12 øðrum monnum er ætlanin at stytta um ferðina við trimum døgum.

Gongst sum ætlað, leggja teir til brots úr Kanarisku Oyggjunum nýggjársaftan. Og so skuldu teir helst tikið seinasta takið inn til Barbados 30 dagar seinni.

- Hetta er als ikki ein ómøgulig uppgáva, tí mett verður, at okkara manning er væl betri fyri enn tær undanfarnu. Men so skulu vit heldur ikki møta stórvegis trupulleikum á ferðini, eins og vindur og streymur mugu verða okkum til vildar.

- Gongur alt hetta upp í eina hægri eind, kunnu vit leggja at hinumegin Atlantshavið seinast í januar mánaði, sigur Livar Nysted spentur á málinum.

Seinastu átta mánaðirnar hevur hann vant miðvíst fram ímóti hesi stóru og kravmiklu avbjóðingini. Men so er tað eisini líðugt:

- Eg havi róð í nógv ár, og havi havt fleiri stórar avbjóðingar á árabáti. Hetta verður helst endin á tíð míni sum rógvari!

### Síggi ferðina fyri mær

Hjá Livari og øllum hinum monnunum umborð á »La Mondiale« ræður fyrst og fremst um at vera væl fyri likamliga og fíggjarliga, tí ein slík ferð kostar nógvan pening bæði í fyrireiking og í mistari inntøku.

Hetta er somuleiðis ein kostnaðarmikil ferð hjá manningini. Livar hevur roknað út, at luttøka hansara í ferðini tvørtur um Atlantshavið kostar honum 150.000 krónur, umframt ferðaseðlar og aðrar útreiðslur í hesum sambandi.

Ein annar líka so stórur týdningur er at vera væl fyri sálarliga ella mentalt. Henda fyrireikingin er kanska tann týdningarmesta, tí